## 105 ára dagur í Klaksvík

Tað eru í dag júst 105 ár síaðni, at Klaksvíkarítróttarfelag varð stovnað. Hetta skrivar felagið á heimasíðu sínari. Her verður eisini endurgivið úr 50 ára minnisritinum, sum John Reid Bjartalíð skrivaði á sinni: »Ár 1904 tann 24. august var tað at nakrir menn hittust á fundi á skrivstovuni í handilinum á Biskopsstøð. Fundarevni var: at stovnað eitt ítróttarfelag í Klakksvík.« Fyrsti formaðurin hjá KÍ var annars Haral Haraldsen, vanliga nevndur Harald á trappuni.

## Boban skal venja Mjølnir

Boban Ilic, sum hevur verið leikandi venjari hjá greipuvinnarunum í ÍF, er nú farin til Mjølnir, har hann verður leikandi venjari hjá flogbóltsmonnunum, umframt at hann eisini verður venjari hjá kvinnunum. Tað skrivar Kringvarpið á heimasíðu sínari. Menninir hjá Mjølni megnaðu ikki veruliga at gera um seg í landskappingini í fjør, men vónirnar eru, at liðið í størri mun kann mynda føroyska flogbóltsoddin í vetur, verður sagt við Kringvarpið.

# KÍ ætlar sær víðari

**Í KÍ finna tey seg ikki í, at B36 fekk undantak til at flyta spælaraloyvi. Nú verður kæra send Aganevndini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- B36 knústi okkum sundur, og tað var ikki Christian Restorff Mouritsen, sum einsamallur gjørdi tað. Men vit vilja ikki finna okkum í mátanum, sum málið er handfarið uppá, og tí er eingin ivi um, at vit fara at kæra.

Soleiðis sigur Fríðin Ziskason, nevndarformaður í Sp/f KÍ, har tey nú fyrireika eina kæru til Aganevndina hjá FSF.

- Fyrst og fremst kæra vit, at FSF við hesum brýtur líkheitsprinsippið, sum altíð skal vera galdandi. Tað er rætt, at UEFA-reglurnar loyva undantøkum frá meginregluni um flytingarvindeyga, um talan er um heilt serligt føri. Og tað kunnu vit so diskutera, um talan er um.

- Men somu reglur staðfesta, at verður hetta gjørt, so má ítróttarligi integriteturin eisini varðveitast, og tað meta vit als ikki er hent í hesum førinum. Veruleikin er, at AB og ÍF hava spælt móti einum B36-liði, sum ikki slapp at nýta Christian Restorff Mouritsen, meðan vit í gjár og 07 Vestur komandi sunnudag koma at spæla móti einum B36-liði, sum hevur Christian Restorff Mouritsen, og tá broytir tú fortreytirnar, sum dystirnir verða spældir undir.

- Hetta gjørdi eg eisini FSF-forsetan varugan við hálvan annan tíma undan dystinum sunnudagin, og eg bað hann um at afturkalla spæliloyvið. Men tað varð ikki gjørt, og tí velja vit nú at kæra. Og kravið hjá okkum er, at nýggjur dystur verður spældur, sigur Fríðin Ziskason.

Hartil vísir hann á, at KÍ longu í mai mánaði søkti um undantaksloyvi. Longu 5. mai var Todi Jónsson til reiðar at tørna út fyri barndómsfelagið, men hóast Todi ikki hevur spælt fótbólt í hálvtannað ár, og hóast felagið, sum hann seinast spældi fyri ikki longur er til, fekk KÍ ikki viðhald í, at talan tá var um heilt serligt føri.




**Nevndarformaðurin í Sp/f KÍ vil ikki finna seg í, at B36 hevur fingið spælara uttan fyri flytingarvindeygað, tá KÍ fyrr í ár fekk noktandi svar upp á líknandi umbøn**



## Nú er hol á skónum

**Tvær ferðir upp á eitt summar hevur FSF skotið seg sjálvt í fótin**

ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lat tað verða sligið fast, at tað er gleðiligt fyri føroyskan fótbólt, at ein spælari við evnunum hjá Christiani Restorff Mouritsen nú aftur er at síggja á fótbóltsvøllinum. Tí talentir av tí kalibaranum fáa vit illa verið fyriuttan.

Men tað nertir ikki tann veruleika, at undantakið, sum Kappingarnevndin kom við fríggjadagin, ríður væl og virðiliga um markið av tí, sum er rætt og rímiligt.

Staðfestast kann í øllum førum, at hóast næstu grannalond okkara øll eru á einum máli um, at hetta ikki hevði gingið hjá teimum, og hóast løgfrøðisliga ráðgevingin hjá FSF staðfestir, at eitt forgloymisli ikki kann roknast sum heilt serligt føri, so hevur Kappingarnevndin tikið avgerð um, at talan kortini eru um heilt serligt føri. Ein avgerð, sum í besta føri kann tulkast so, at niðurstøðan um at loyva flytingini, varð gjørd, longu áðrenn viðgerðin fór fram, og at kumpassin í viðgerðini tí er stillað eftir hesum.

Fyri fáum vikum síðani tók FSF avgerð, sum í veruleikanum innibar, at rættartrygdin hjá sáttmálabundnum spælarum er sett til viks, tí tað hevur ikki longur týdning, um feløgini rinda spælarunum ásettu lønina ella ikki.

Hesa ferð hevur FSF tikið eina avgerð, sum væl kann gjøgnumhola regluna um flytingarvindeyga.

Diplomati er sjálvandi av tí góða, og tað er alla æru vert, at eisini FSF í størst møguligan mun roynir at finna semjur um tær ósemjur, sum annars eru í føroyskum fótbólti. Men tá semjurnar og niðurstøðurnar bera bráð av, at tað týdningarmesta er at glatta út og feiða undir teppið, verður talan heldur um eitt slag av ómegd, sum er føroyskum fótbólti til lítlan sóma, nú vit í tvey áratíggju av øllum alvi hava roynt at eta kirsuber saman við teimum stóru.

# Fleiri feløg mótmæla avgerðini

**Tað ljóðar fyri vist, at FSF ein av fyrstu døgunum fær mótmælisskriv frá átta av teimum tíggju feløgunum í Vodafone-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum skilst hevur KÍ heitt á øll feløgini í Vodafone-deildini – HB og B36 undantikið – um at vera partur av mótmælisskrivi til FSF.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa at vita neyvt, hvat innihaldið í skrivinum er, men talan er í øllum førum um áheitan til FSF um at fylgja altjóða reglunum um flytingarvindeyga.

Tað hevur heldur ikki eydnast okkum at fáa at vita, um feløgini samstundis hótta við tiltøkum mótvegis FSF ella kappingini í Vodafone-deildini, um málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen ikki verður tikið upp til nýggja viðgerð.

At HB og B36 ikki eru partur av mótmælinum, kemst av, at tað vóru júst hesi feløg, sum vóru partur av málinum um flytingina av spæliloyvinum.